Viðmerking:

# Hvat er nú til ráða at taka í Gundadali?



Ólavur Hátún heldur, at Tórsvøllur skal verða veruligt landsstadion, har frælsi ítrótturin eisini eigur innivist



Síggi í bløðunum, at málið um Tórsvøll hevur verið fyri drúgvari viðgerð á aðalfundi í FSF – tó ikki sum ítróttamál, men sum húsamál. Limafeløgini úti um landið, og onkur í Havn við, hava á hesum fundi givið til kennar, at tey eru ikki nøgd við, at fótbóltssambandið í so stóran mun hevur gjørt sær hendan ítróttavøll í Havn til sítt mál, at tað fíggjarliga fyribils hevur bundið seg við ikki minni enn 5,5 milliónum í ein bygning, sum enn ikki er annað enn ein beinagrind, ið ivaleyst fer atkosta upp móti teim 20 milliónunum, áðrenn liðugt verður.

Men formaðurin, Torleif Sigurðsson, hevur í aðrar mátar roynst fótbóltinum so dyggur, at menn heldur bara vildu taka hansara framferð í hesum Tórsvallarmáli til eftirtektar enn lat ahann fara frá sum formann, so sum hann hótti við, um hann ikki fekk sín vilja.

At føroyskur fótbóltur hevur tikið seg so væl upp í altjóða høpi hevur m.a. Torleif Sigurðsson allan heiður uppibornan fyri; men at hann hevur verið ein tann ítarsti til, sum tað tykist, at beina fyri møguleikanum fyri einum veruligum landsstadion í Føroyum, tað fara fólk í Føroyum, sum ítróttaliga hava annað og meira enn bara fótbólt í huga, ikki at siga honum tøkk fyri.

Men høvuðspersónarnir í hesari ótruligu søk eru eyðsýniliga advokaturin Jógvan Páll Lassen og fyrrverandi býráðsformaður Poul Michelsen. Á fundi fyri brátt ári síðan um Tórsvøll, har endamálið var at fáa veruligu viðurskiftini fram í ljósið og at fáa allar ítróttaligar og samfelagsligar partar at bera fram sína hugsan, vóru hesir báðir teir einastu, sum saman við Leivi Hansen, býráðsformanni, talaðu fyri broyttu kósini í hesum gamla frítíðar- og ítróttamáli, og framvegis eru tað bara hesir menn, sum tala fyri avskeplaðu ætlanini.

Á nevnda fundi kom onki sannførandi fram um tað myrkaspæl, sum onkur av luttakarunum skírdi framferðarháttin í hesum máli; heldur vóru somu sniðfundigu og villleiðandi útsagnir at hoyra, sum eisini okkara pressa tíverri alt ov nógv hevur latið teigar til.

### Hongur ikki saman

Tað man tó nú vera hugsandi fólki greitt, at útsagnirnar hanga illa saman hjá hesum monnum, sum soleiðis hava ført ta bjørtu hugsjón út í óføri. Jógvan Páll Lassen í Sosialinum í farnu viku: »Nú er ein avtala fingin í lag við fótbóltssambandið, og nú fer grunnurin undir at fáa arbeiðið frá hondini, sum enn restar í á hinum partinum av Tórsvølli. Fíggjarliga eru tingini í lagi«. – Eru tingini veruliga fíggjarliga í lagi til »hin partin av Tórsvølli«, um Fótbóltssamband Føroya, sum bert undir trýsti gongur við til at inniloka eitt byggiskapilsi og onki meira, skal vera fíggjarliga álitið? – Og Poul Michelsen í Dimmalætting: »Fíggjarætlanin hjá okkum heldur, og lánibyrðan er, sum vit høvdu væntað«. Høvuðsgrundgevingin fyri ikki at leggja støði til eitt fullfíggjað stadion í fjør, tá ið umstøðurnar vóru optimalar til tað, segðist vera tann, at grunnurin toldi ikki lánibyrðina, um samlaði kostnaðurin fór upp um 10 milliónir, og nú er onki óført, nú kostnaðurin man vera farin upp móti tí tífaldaða! – Poul framhaldandi· »Tað fer ikki at ávirka Tórsvøll nakað, um landsdystirnir verða spældir á Svangaskarði ella á Tórsvølli (í fjør vórðu allar árar eirindaleyst lagdar í sjógv til tess at fáa landsdystirnar til Havnar!)… FSF rindar eitt fast árligt gjald, antin tað ger nýtslu av vøllinum ella ikki (man slíkur hugburður fara at halda sær í fótbóltssambandinum?)… Tórsvøllur skal eisini fáa inntøkur frá at leiga hann út…« – Tosar tú veruliga í álvara, Poul? Men evstu ábyrgdina eiga býar- og landsmyndugleikarnir, sum væl og virðiliga vórðu kunnaðir um, hvønn veg leiðin bar. Málið er tó ikki farið heilt fyri bakka, um enn tað nú verður kostnaðarmikið at rætta kósina uppaftur.

Tað kann tykjast láturvert av mær sum leikmanni at vilja leggja myndugleikum ráð um viðurskifti sum hesi; men so dillettantiskt sum tað higartil er farið fram í hesum byggimáli, má ein og hvør borgari hava loyvi til at bera fram sína hugsan til bata. Fyri mær at síggja má nú fyrsta stigið vera, at býráðið tekur málið í egnar hendur og loysir teir menn frá upgávuni, sum soleiðis hava misrøkt almenna álitið. Tvinni viðurskifti verða síðan at hava í huga av nýggjum: útsjóndin og endamálið.

Í sínari tíð, tá ið professionella stadionætlanin hjá teimum trimum arkitektafeløgum, sum so ráðisliga og uttan nakra grundgeving vórðu skúgvað til viks, varð alment lýst á fyrsta sinni, vóru røddir frammi um, at slík ógvislig byggiætlan fór at skemma umhvørvið í Gundadali. Upprunaliga Tórsvallarætlanin var tó ólíka meira estetiskt gjøgnumhugsað enn tann skemd, sum uttan útsjóndarligt fyrilit nú stendur tveitt upp í hesum býarins fagrasta frítíðarøki. Dugi illa at hugsa mær, at byggi- og býarskipanarnevnd býráðsins kann hava góðtikið, at hasin púra óneyðugi áskoðaraskráin varð settur upp á suðursíðuni, ella at slík bingja skuldi kloykjast oman á vestaru áskoðaraplássini til fasilitetir, sum arkitektarnir í sínum projekti høvdu bygt ósjónliga inn í heildina. Tað má nú vera eitt fólkakrav, at hesir skemmandi partar verða tiknir niðuraftur, hvør ið so enn skal bera fíggjarliga kostnaðin av tí.

### Landsstadion

Spurningurin verður síðan, um vit ynskja eitt landsstadion í Føroyum, og um tað ber til at venda aftur til upprunaligu ætlanina í Gundadali. Okkara býráð tykist ikki at hava slept ætlanini um umstøður eisini til frælsan ítrótt, nú tað í einari tríáraætlan hevur sett eina millión krónur av á fíggjarlógini í ár til eina rennibreyt.

Henda fyrsta milliónin kann væl saktans best nýtast til eitt endamál, og tað er at taka áskoðaraplássini á eystursíðuni niðuraftur og flyta tey, soleiðis sum tað jú lá í kortunum hjá »grunninum« at gerast skuldi. At fara og leggja eina rennibreyt aðrastaðni enn í Gundadali má metast at vera veruleikafjart, tí fyri tað fyrsta verða tá fleiri milliónir at binda bara í grundøki, sjálvt um býráðið skuldi latið av sínum egna, og harnæst kann ein berur renniringur ikki skapa tað umhvørvið og tann trivnað, sum er ein fortreyt fyri, at slík íløga skal kunna fáa nakran ítróttaligan og samfelagsligan týdning. Og mundi ikki eisini fótbólturin havt gagn av, at umstøður til renniíðkan vóru á fótbóltsøkinum?

Men frælsur ítróttur er meira enn bara renning, hann krevur umstøður eisini til bæði kast og lop. Tað er ongin virðilig loysn hjá okkara býráð bara at vísa til eyrflata úti á einari høvd í Eysturbýnum. Fær frælsi ítrótturin ikki sømilig kor, kann hann ikki taka seg upp sum verulig ítróttagrein í býnum og fær heldur ikki týdning fyri frítíðarlívið og fólkaheilsuna.

Men eisini í hesum ber Tórsvøllur í sær møguleikar. Ikki er so nógv pláss við norðurendan, men verður fráboðaða ætlanin um at flyta eystaru áskoðaraplássini longur eystur hildin, skuldi tað heldur ikki verið nakað stórmál at flutt eisini elmentini á suðursíðuni - tey kunnu møguliga skoytast uppí á eystaru langsíðuni ella t.d. latast øðrum bóltvølli í landinum – og tá kann Tórsvøllur lúka allar treytir til fullfíggjað stadion.

At slík umbygging fer at krevja fleiri milliónir, enn reisast kunnu eftir fáum árum, er eyðsæð; men tíðin er nú til at seta út í kortið av nýggjum. Vit kunnu ikki bara sleppa endanum, lata henda skammarvarða verða standandi eftir okkum fyri eftirtíðina og lata frælsa ítróttin verða við skerdan lut.

**Ólavur Hátún**

# Kári á Rógvu heldur fyrilestur um valdstríbýti

*Hetta er seinasti fyrilesturin í eini røð við evnum úr millum annað Hvítubók*

Fróðskaparsetur Føroya og Føroya Fróðskaparfelag skipa fyri almennum fyrilestri á Fiskirannsóknarstovuni mikukvøldið 1. mars 2000 kl. 20.00.

Kári á Rógvi, cand.jur. LL.M., heldur fyrilestur, ið hann kallar *Parlamentarisma og valdstríbýti*. Hetta er sjeyndi og seinasti fyrilestur í røðini við evnum m.a. úr Hvítubók.

Kári á Rógvi er útbúgvin juristur á universitetinum í Keypmannahavn. Haraftur-at hevur hann lokið prógv sum Master of Laws við universitetið í Aberdeen. Undir lesnaðinum í Danmark arbeiddi hann í fólkatinginum og á eini advokatskrivstovu. Kári starvast nú sum skrivari hjá grundlógarnevndini.

Fyrilesturin snýr seg um tvær ógvuliga týðandi lærur í galdandi stýrisskipanarlóg, parlamentarismuna og valdstríbýtið. Hesar hava havt stóra ávirkan á stjórnarskipanir víða um. Báðar lærur hava tó ein heilt serligan uppruna, søguliga og ideologiskt. Fyrilesturin er ein roynd at greina tær søguligu fortreytirnar og síðani spyrja: Er grundarlag enn fyri at varðveita hesar gomlu meginreglur í verandi líki?

Parlamentarisman er ein avleiðing av stríðnum millum fólkavalda tingið og kong um fyrisitingarvaldið. Sigurin hjá parlamentunum hevur merkt, at stjórnirnar í norðanlondum og aðrastaðni nú eru óbeinleiðis fólkavaldar. Men hetta hevur eisini ført við sær, at tað eru politisku samgongurnar, ið stýra bæði tingi og stjórn. Tann formligi rætturin hjá tinginum at samtykkja misálit, stýra fíggjarjáttanini, góðkenna millumlandasáttmálar, smíða lóggávu eins og aðrar parlamentariskar heimildir eru tí ikki veruligar heimildir í dag.

Valdsbýtislæran hevur sín uppruna í hugsanum hjá enskum hugspekingum seinast í 17. øld, serliga John Locke. Her hjá okkum hevur vanlig fatan verið, at valdið eigur at vera tríbýtt. Hetta byggir partvís á serligu tilgongina, tá danska grundlógin varð skrivað. Hugt verður at, um tíðin ikki er komin at kjølfesta eitt nýtt valdsbýti, grundað á tankarnar hjá Locke og øðrum, men tillagað veruleikanum á okkara døgum.

Samanumtikið eru parlamentarisma og valdstríbýti tey mest týðandi prinsippini í verandi stýrisskipan. Men spurningurin kann setast, um vit blint hava elt eftir, har fyri var slóðað. Í hesum tíðum, tá allir flokkar eru samdir, at broytingar skulu gerast í valdsbýtinum millum land og ríki, mugu vit duga sjálvi okkum slóðir at bróta.



Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

# Stjørnurnar glitraðu

*Eftir ein sera undirhaldandi dyst í KÍ-høllini leygardagin, kundu kvinnurnar hjá Stjørnuni saman við mongu áskoðarunum fegnast um, at nú er so at siga komið á mál í FM-stríðnum*



*Tá dysturin endiliga var lokin, kundu leikarar og áskoðarar fegnast um, at klaksvíkingar so at siga høvdu tryggjað sær meistaraheitið, hóast teimum enn væntar at leika nakrar dystir*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

JÁKUP MØRK

Stjørnan-VB 34-27 (15-18)

Høllin var so at siga stúgvandi full leygardagin, tá Stjørnan, sum alt árið hevur ligið á odda, fekk vitjan av VB.

Vann Stjørnan dystin, kundu tær so at siga kalla seg meistara, og á pappírinum skuldi hetta verið ein uppgáva, sum til bar at loysa. VB hevur nevnliga ikki fingið serliga góða úrtøku burtur úr sínum dystum hetta kappingarárið, og liggja tær í løtuni á einum fimta plássi.

Í fleiri av dystunum, hevur tað kortini verið sera nær við hjá VB, sum kortini hevur drigið styttra stráðið í dystum móti hinum liðunum. Talan hevur í nógvum førum verið um sera góðan hondbólt, og eitt nú var um reppið, at tær megnaðu at basa Kyndli í steypafinaluni.

Klaksvíkingar mundu tískil ikki vænta sær nakran léttan dyst leygardagin, og fingu tær so sanniliga heldur ikki.

### Javnur fyrri hálvleikur

Sjørnan byrjaði annars dystin við at senda Andrijanu av stað tvær ferðir, og skjótivongurin sendi báðar ferðir bóltin í netið, men tær á mótstøðuliðnum góvust tó ikki so. Spakuliga tóku tær seg inn á Stjørnuna, og hóast tað leikaði sera javnt á, so var tað VB, sum átti munin meginpartin av tíðini.

Annars er vert at leggja til merkis, at stjørnukvinnurnar tóktist rættuliga tyngdar av uppgávuni, nú gullið var komið somikið nær, og hetta haldi eg eisini ávirkaði spæl teirra stóran part av dystinum.

Hetta sást kanska best tá mál vórðu skotin, so vóru smíl og látur at síggja á VB liðnum, meðan tað hjá Stjørnuni heldur tóktist sum ein lætti, hvørja ferð onkur av leikarunum megnaðu at skora.

Í slíkum støðum kemur ofta væl við, um nakrir av leikarunum hava nakrar royndir at dúva upp á, og hetta vísti leikandi hjá Stjørnuni, Vesna Tomajek, eisini. Hon var við í tí mesta á vøllinum, og tá skotroyndirnar hjá Simonu ikki vildi fara í málið, so kom sera væl við, at venjarin var somikið væl fyri.

Hjá VB tóktist serliga Arnleyð at vera væl fyri, men eingin av hinum leikarunum eigur at verða gloymd fyri sítt spæl. Allar sum ein stríddust tær í verjupartinum, og bæði skjótu mótálopini og strikuspælið riggaði sera væl.

Somikið væl gekst hjá VB, at tá farið varð til hálvleiks, var ikki nógv, sum bendi á, at Stjørnan skuldi vinna dystin, og sjónligasta tekini um hetta hekk á bróstinum, har máltalvan segði frá, at VB hevði skotið trý mál fleiri enn Stjørnan fyrstu 30 minuttirnar.

### Full ferð á Stjørnuna

Nú veit eg ikki, hvat klaksvíksgenturnar høvdu tosað um í hálvleikinum, men tær komu sum ódnarveður móti VB-liðnum, nú seinni hálvleikur fór í gongd.

Hetta gav eisini rættuliga skjótt úrslit, og eftir einum fimm minuttum, høvdu tær aftur fingið samband við VB. Lagið á áskoðarunum var sum vera man sera gott, og ivaleyst hava øll viðhaldsfólkini gjørt sítt til, at tað nú fór at gangast betri.

Í øllum førum lyftist spælið hjæa heimaliðnum enn meira, men kortini megnaðu tær ikki rættuliga at skræða seg leysar frá VB. Suðuroyargenturnar megnaðu enn tá at vinna seg fram um enn einaferð, men hetta nervaði ikki Stjørnuna.

Klaksvíksgenturnar, sum nú rættuliga høvdu fingið ferðilin av gullmerkjunum, settu enn meira ferð á, og móti endanum av dystinum skramblaði so alt saman hjá VB.

Stjørnan slapp rættuliga ótarnað at skjóta fimm mál teir báðar seinastu minuttirnar, og rómurin í høllini var øgiligur tá Vesna móti endanum av dystinum kundi leypa frá veinginum og skorað, eftir at bólturin varð lyftur inn í málteigin.

### Viljin var á muni

Vágsgenturnar taptu sum kunnugt dystin við ikki færri enn sjey málum, men verður sæð burtur frá teimum báðum seinstu minuttunum, so megnaðu tær so sanniliga at geva komandi føroyameistarunum dygga mótstøðu.

Munurin var tó helst, at viljin og sigurshungurin hjá heimaliðnum var nakað størri enn hjá gestunum.

Annað var, at breiddin í stjørnuhópinum er væl størri enn hjá VB, og tískil kundu tær lata stuðulsleikararnar hvíla seg nakrar minuttir, uttan at hetta darvaði spælinum serliga nógv.

Eisini gevur breiði hópurin nógv størri valmøguleikar hjá venjaranum, og í øllum førum er tað ein sannroynd, at spælið hjá Stjørnuni fór at ganga munandi betri, tá Sólva Eystberg kom á vøllin í seinna hálvleiki.

Veteranurin, sum hevur verið skadd stóran part av árinum, hevur kanska ikki orku til at spæla ein heilan dyst, men leygardagin lá hennara partur so sanniliga ikki eftir.

Ja, breiddin á liðnum er somikið stór, at tað ikki man vera langt av leið at siga, at klaksvíksgenturnar høvdu megnað at vunnið meistaraheitið, hóast tær báðar útlendsku ikki høvdu verið á liðnum. Við núverandi manning er í øllum førum eingin ivi. Klaksvíkingar eiga so nógv tað besta kvinnuliðið í landinum, tá um hondbólt ræður.

Gaman í, so restar teimum enn eitt stig, áðrenn tær eru 100% vísar í FM heitinum, men tað krevur so eitt undur av teimum heilt stóru, um hetta ikki skal eydnast teimum.

### Kann gerast heilt gott

VB liðið hevur tó eisini góðar møguleikar at gera seg galdandi komandi árini. Á liðnum eru fleiri heilt góðir leikarar, sum eisini hava aldurin við sær, soleiðis at tær kunnu vera við á liðnum í fleiri ár frameftir.

Kanska er hópurin í so tunnur í ár, men fleiri ungar gentur eru á veg inn í hópin, so megna tær at halda fast við fólkið, er einki at ivast í, at tær komandi ár megna at vinna sær eina betri endastøðu enn núverandi fimta plássið.

Fleiri dystir hetta árið hava tær tapt sera tepurt, og verður sæð burtur frá teimum báðum seinastu minuttunum leygardagin, var eisini her talan um ein sera javnan dyst. Ein dyst, sum helst man teljast millum bestu dystirnar, sum hava verið í ár, og sum kunnugt skulu tvey lið til fyri at skapa ein góðan dyst.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Stjørnan: Vesna Tomajek 12 (4), Andrijana Milodanovic 8, Annika Ljósstein 4, Jastrid Gullaksen 3, Anna K. Samson 3, Simona Hansen 3, Joan M. Joensen 1
VB: Arnleyð Krosslá 6, Christina Holm 6, Gurið Mortensen 4, Regina Rádó 4 (2), Sólrun Krosslá 4, Rannvá Augustinussen 2, Eyðbritt Krosslá 1
**Brotskøst:**
Stjørnan 4, VB 3
**Útvísingar:**
Stjørnan 3, VB 2
**Dómarar úr Kyndli:**
Hanus Kúrberg og Hans Thomassen

